karðsá:

# llgongu í heili 47 ár

*Áðrenn Petur Skeel við vissu kann siga, um brundurin brundar glarfiti, noyðist hann fyrst til eigararnar, tá ið flett verður at skriva niður, hvat er undan hvørjum seyði. Síðan fer hann fyrst í desember í hjallin hjá teimum at hyggja, hvussu kjøtið sær út*





*- Eg havi lagt alt mítt lív í seyðin, og eg eri slett ikki troyttur av at fáast við seyð, seyðahald og seyðaroyndir, sum eg havi lagt nógva orku í, sigur Petur Skeel Skarðsá, røktingarmaður í Funningi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

gjørt ár um ár.

Stríðið av hesum er serliga seyðurin, sum skal havast inni, til vissa er fingin fyri, at hetta er tann rætti seyðurin.

Petur sigur, at nú so at siga bara glarfiti er í heimara parti Inni í Haga, er at halda fast um hetta, soleiðis at blandingur ikki kemur í aftur.

- Somuleiðis er at halda fast í hinum hagapørtunum, har vit eru komnir so nær málinum, leggur hann aftrat.

## Føroyskur seyður

- Føroyski seyðurin er flabbutur framman og hevur stuttan skort. Hann hevur nógva ull frammi í skortinum, er væl ullaður um beinini og er lágføttur. Hann er ikki skarvvaksin, sum røktingarmaðurin tekur til.

Petur Skeel sigur, at alt tað útlendska kjøtið, sum verður keypt higar til lands, hevur tálgafiti, og tá er talan bæði um íslendskt, hetlendskt, skotskt og nýsælendskt kjøt.

- Men tann gamli reini føroyski seyðurin ber glarfiti, og eg haldi tað vera ógvuliga umráðandi, at vit royna at varðveita hendan seyðin og hetta kjøtið. Blandaði seyðurin í Føroyum ber eisini tálgafiti, og tí er neyðugt at gera eitt stórt arbeiði kring um landið, um vit skulu fáa føroyska seyðaslagið aftur í hásæti í Føroyum.

Hann undrast yvir, at so lítið hoyrist um hesi viðurskifti - og fýlist á, at so lítið verður gjørt fyri at varðveita glarfitina.

## Seyðaskannarin

- Nú hava teir fingið ein sonevndan seyðaskannara á Royndarstøðini, men eg dugi ikki at síggja, at hetta loysir trupulleikan og hjálpir til at varðveita føroyska seyðaslagið.

Petur vísir á, at skannarin er komin úr Íslandi, har allur seyðurin, sum hann veit um, hevur tálgafiti.

- Tað nyttar so lítið, um vit fáa feitari seyð í Føroyum, um seyðurin ber tálgafiti, tí tað er ikki vist, at fólk hava áhuga í at eta feitt kjøt, sigur Petur Skeel Skarðsá, sum at enda heldur fyri, at nógv betur hevði verið, um Royndarstøðin í nógv størri mun gjørdi nakað til tess at varðveita góða føroyska seyðaslagið.

---

í Timburhandlinum mikudagin, har kunnað varð um handilin, og hetta var ein góður fundur, sum hann tekur til.

- Vit fara ongum at siga úr starvi, og vit hava ongar ætlanir um at umskipa virksemið stórvegis.

Hann væntar, at KN fer at geva sær góðar stundir at hyggja øll viðurskifti ígjøgnum, og sum tíðin líður, væntar hann, at nýggja felagið, sum nú eigur P/F Højgaards Handilsvirki, onkusvegna fer at seta síni fingramerki á virksemkið.

- Eini 26-28 fólk starvast hjá P/F Højgaards Handilsvirki, og vit ætla, at hetta framhaldandi skal vera eitt gott og stabilt arbeiðspláss, sigur Jónsvein Knudsen, stjóri í partafelagnum KN.




*Trygvi Mortensen hevur verið dagligur leiðari hjá P/F Højgaards Handilsvirki seinastu árini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


BYGGIBÚÐ

damor



Admiral hitablæsari
- 2000 watt
- Kann blása heita ella kalda luft
- 2 instillingar á 1000 ella 2000 watt
- Hevur termostat

125,-



Lutz
- Kap og geringssag
- 1200 watt
- 4500 O/min
- Klinga Ø210x30x2,5
- Sker 47 gradir smid

1.398,-



Brovst ruskstativ
- Síðurnar eru impregneraðar
- Ramman og lokið eru galvaniseráð
- Roynist væl í føroyska veðurlagnum

998,-



Scandic WC kumma
- Fjalt vatnlás
- 3 og 6 L skol
- lætt at reingerða
- uttan setur

898,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001

damor